# Hvør fernisering er ein próvtøka

Fyri viku síðan lat Øssur Mohr upp framsýning í Keypmannahavn við útvið tríati nýggjum málningum. Sosialurin hitti fuglfirðingin til ferniseringina í gallarí Sct Gertrud



*- Fyri mær er hvør fernisering sum ein próvtøka, sigur fuglfirðingurin Øssur Mohr, sum í hesum døgum sýnir útvið 30 nýggjar málningar fram í gallarí Sct Gertrud í Keypmannahavn*

*Orð og myndir: Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@kallnet.fo*

Fryntligi eigarin av gallarí Sct Gertrud, Kurt Svendsen, bjóðar kaffi og wienarbreyð. Klokkan er farin um hálvgum tólv henda leygarmorgun í Keypmannahavn. Við runda borðið í gallarínum sita tríggir fuglfirðingar. Listamaðurin Øssur Mohr, tónleikarin Stanley Samuelsen, ið skal spæla til ferniseringina, og blaðmaðurin. Um góðan tíma lata dyrnar upp.

Øssur er spentur.

– Jú, eg má viðganga, at eg havi summarfuglar í búkinum. Hvør fernisering er sum ein próvtøka fyri mær, sigur 42 ára gamli listamaðurin.

Málningarnir vóru sendir til Danmarkar í góðari tíð, og nakrir teirra vóru við á stórari listastevnu í Herning um mánaðarskifti. Hósdagin fór listamaðurin úr tí nú heldur tómliga atelierinum heima við hús í Fuglafirði til Keypmannahavnar fyri at hanga málningarnar upp og vera við til ferniseringina.

– Tað er ikki frítt, at tað kennist løgið at ganga í atelierinum, tá flestu málningarnir eru burtur. Tað er sum at senda ein part av tær sjálvum avstað, greiðir Øssur frá.

Men tá ein sum Øssur hevur valt at gerast listamaður burturav, so er tað ein veruleiki, ið ikki kemst uttanum.

– Skal eg vera púra erligur, so havi eg onkuntíð verið glaður fyri at fáa onkran málning heimaftur eftir eina framsýning. Bæði tí eg havi viljað broytt hann, men eisini tí at eg eri vorðin so góður við hann.

## Málar hvønn dag

Aftan fyri málningarnar hjá Øssuri Mohr, ið flest allir taka støði í nærumhvørvinum í Fuglafirði, liggur nógv og drúgt arbeiði. Nógv tíð fer við at mála umaftur og umaftur, mála útyvir og skava burtur.

– Tað er ein kunstur at vita, nær ein skal gevast - at duga at steðga á og siga, at nú er málningurin liðugur.

Øssur greiðir frá, at hann fleiri ferðir hevur oyðilagt ein málning, tí hann ikki hevur dugað at steðga á.

– Eg kann hava fingið eitthvørt serligt fram í einum málningi, men í míni roynd at gera hann enn betur havi eg síðan oyðilagt hann. Og hvussu eg so royni, so fái eg ikki hetta serliga fram aftur. Tað er sjálvandi óheppið, men tað lærir ein eisini nakað av, metir Øssur.

– Eisini plagi eg at spyrja konuna. Hon er erlig, og so er tað upp til mín, um eg lurti, leggur hann smílandi afturat.

Øssur Mohr greiðir frá, at fyri hann er týdningarmikið, at nærumhvørvið og gerandisdagurin er í lagi. At familjan og børnini hava tað gott og at einki átrokandi liggur á láni. Tá kemur mest burturúr í atelierinum.

Seinastu trý árini hevur Øssur verið listamaður burturav. Og sjálvandi eru dagar, tá einki ber til - tá ikki fæst tað fram í málningunum, sum listamaðurin ynskir sær.

– Eftir mínum tykki er tað sera týdningarmikið at vera í gongd alla tíðina, at royna. Sjálvandi er gott at leggja pensilin eina løtu, fara úr atelierinum, kanska spáka sær ein túr. Men hjá mær nyttar einki at ganga og bíða eftir inspiratiónini.

Hetta er ein av orsøkunum til, at Øssur altíð er í holt við fleiri málningar í senn. Sum oftast standa tríggir til fimm málningar í ymiskum støddum í atelierinum, sum hann arbeiðir við.

Øssur samanber tað við ein ítróttarmann, ið eisini hevur tørv á at venja alla tíðina, eisini tá tað kanska ikki gongur so gott í kappingum. Hann leggur afturat, at tað til tíðir kann vera tungt og kennast møtimikið at mála, men tá so gongd kemur á og alt riggar - tá eru keðiligu løturnar langt síðan gloymdar.

## Hvítvín og djús

Klokkan stívliga eitt koma fyrstu vitjandi á gátt í Sct Gertrud, og løtu seinni fer at fyllast í lítla, men hugnaliga gallarínum í Hyskenstræde 9, ið er ein síðugøta til Strøget.

Á runda borðinum verður hvítvín og djús sett fram til gestirnar, ið eru komnir at heilsa uppá listamannin og málningar hansara. Bæði føroyingar og danir koma á gátt. Nøkur teirra kennir Øssur, onnur eru fremmand. Men lítillætni og róligi listamaðurin gevur sær stundir at heilsa uppá og práta við øll. Tað er týðiligt, at hann kennir seg væl millum sínar málningar, ið prýða hvítu veggirnar.

Øssuri dámar væl at sýna fram – at longu dagarnir í atelierinum heima við hús síggjast aftur í eini framsýning.

– Ein kann gott mála í nógv ár uttan at koma fram við síni list, men sjálvur hevði eg ikki dugað tað. Ikki tí, eg havi nógvar málningar, sum ikki koma úr atelierinum, antin tí at eg eri vorðin so glaður fyri teir, ella tí teir ikki eydnast, greiðir Øssur frá.

Øssur hevur á hvørjum ári síðan 1991 havt málningar við á Ólavsøkuframsýningini, hevur í 10 ár luttikið á Várframsýningini í Listaskálanum, og seinastu árini hevur hann eisini sýnt fram einsamallur.

Harumframt hevur Øssur í miðal havt tríggjar framsýningar í Danmark um árið seinastu árini. Sum longu nevnt var hann við á stóru listastevnuni í Herning um mánaðarskiftið, nú er hann í Keypmannahavn, og seinni í ár gongur leiðin til Vesturjútland. Harumframt skal hann vera við á stórari norðurlendskari listaframsýning í Schlesvig í Norðurtýsklandi í juni.

– Hvor ligger Fuglefjord i forhold til Torshavn?

Fleiri ferðir fær Øssur spurningin frá vitjandi dønunum í Sct Gertrud. Ein av gestunum sigur seg ivast í, hvørt heimstaður Øssurs ikki liggur á Fugloy. Felags fyri flestu teirra er, at tey antin hava verið í Føroyum ella hava ætlanir um at vitja oyggjarnar í útnorður. Men spurningarnir røkka longur enn til landalæruna. Róliga greiðir Øssur frá, hvussu hann málar, um litspælið í málningunum og um motivið, ið er Fuglafjørður.

Grundmotivið í teimum útvið tríati málningunum hjá Øssuri er tað sama. Bygdin, fjørðurin, fjøllini hinumegin og luftin, so á tann hátt líkjast teir hvør øðrum. Og tó.

Øssur hevur gjørt tað til sín stíl at síggja nógvu og skiftandi litirnar í náttúruni. At fanga ljósið og mála spælið millum litirnar.

– Eg má siga, at eg við hesum havi funnið mín stíl, og eg haldi ongantíð, at eg verði troyttur av honum, tí eg síggi so nógvar ymiskar litir í náttúruni.

Øssur greiðir frá, at hann til dømis ikki kundi hugsað sær at málað andlitsmyndir, hóast hansara listarliga byrjan í áttatiárunum júst vóru málningar av fólki, millum annað av børnunum. Men eitt skeið á listaskúla í Holbæk í 1993-94 gjørdi, at hann fór at mála náttúruna og landsløg.

## Reyð klisturmerki

Fólk koma og fara, práta og eygleiða málningarnar, meðan bleytir og róligir tónar frá gittaranum hjá Stanley Samuelsen seta sín dám á. Hinumegin smølu gøtuna eru hárfríðkanardamurnar lidnar fyri í dag og kunnu halda vikuskifti.

Á stóra skriviborðinum hjá Kurt Svendsen, ið stendur beint innan fyri dyrnar, liggur eitt ark við smáum reyðum klisturmerkjum. Svendsen skrivar í blokkin, leggur pípuna frá sær og reisist úr stólinum. Ein av málningunum á innasta vegginum skal hava eitt klisturmerki.

Sjálvur er Øssur Mohr nøgdur við ferðirnar, hann hevur sýnt fram í Danmark. Hann dugir ikki at seta tal á, hvussu nógvar málningar hann hevur selt, men tað hevur gingist væl.

Henda seinnapartin má Kurt Svendsen fleiri ferðir eftir reyðu klisturmerkjunum. Men hóast framsýningar og ikki minst søla av málningum er ein fortreyt fyri at kunna liva sum listamaður burturav, so er tað ikki einasta endamálið við at sýna fram. Øssuri dámar væl at hoyra, hvørji skotsmál fólk hava til málningarnar.

– Sjálvandi verði eg glaður, um skotsmálið er positivt. Men tað er gott, tá tú merkir at fólk eru erlig og ikki bara siga okkurt. Eisini um teimum ikki dámar málningarnar. At sýna fram er inspirerandi og gevur nýggjan íblástur, metir Øssur Mohr.

Hann greiðir frá, at tað eru dømi, har onnur hava sæð okkurt í hansara málningum, sum hann ikki sjálvur hevur sæð.

– Tað taki eg ikki sum nakað negativt. Eg kann hava arbeitt leingi við at fáa nakað ávíst fram í einum málningi, og tað kann gera, at eg ikki síggi, at aðrir partar av myndini kunnu tulkast, so teir vísa eitthvørt, ið eg ikki upprunaliga havi hugsað um. Tað kann vera nokkso stuttligt viðhvørt, leggur Øssur afturat.

Eftir ferniseringina gongur leiðin hjá Øssuri heim aftur í atelierið í Fuglafirði. Gerandisdagurin byrjar aftur, og nýggir málningar koma undan kavi.

– Tað tekur nakrar dagar at koma í gongd aftur, og tað kann vera eitt sindur tungt, serliga nú gomlu málningarnir eru burturi úr atelierinum. Men ein fernisering sum henda gevur íblástur og orku til at halda fram, sigur ein væl nøgdur Øssur Mohr.

Framsýningin hjá fuglfirðinginum í gallarí Sct Gertrud í Keypmannahavn er opin til 6. marts.



KVETTIÐ MÓTI MOSSADEGH

# OPERATIÓN AJAX

**Triði partur**



*Eftir Hanus Kamban*



*Mossadegh var á vitjan í USA í 1952. Her sæst hann heilsa upp á forsetan Harry Truman, sum var hart ímóti at gera kvettroynd í Iran*

## FYRI DÓMSTÓLIN Í HAAG

SUM NEVNT í seinastu grein varð Mohammad Mossadegh við demokratiskari avgerð og av einum at kalla einmæltum tingi tann 28. apríl 1951 valdur til forsætisráðharra í Iran. Hansara fyrsta stóra politiska stig var at ognartaka tað enska oljufelagið Anglo-Iranian.

Atburðurin hjá Bretlandi yvir av hesi avbjóðing er áhugaverdur sum dømi um eitt hjálandapolitiskt paradigma. Mangir bretar, teirra millum serliga høgravendir politikarar sum Winston Churchill og Anthony Eden, vóru enn sannførdir um, at Britannia ráddi yvir "aldunum" og kanska altíð fór at gera tað. Teirra vanvirðing fyri politikarum úr fátækum triðjaheims londum var at kalla uttan mark. Hvat mundi Mossadegh hugsa fyri sær?

Bretland valdi í fyrstu syftu at royna tvær atgerðir, eina løgfrøðiliga og eina av búskaparligum slag.

Hvat ið viðvíkir løgfrøði, royndi Bretland at fáa altjóða dómstólin í Haag at gera av, at teir av røttum áttu oljuvirkið í Abadan og oljumráðið á leiðini. Yvir av teirra dugnaligu sakførarum stóð eitt lið av iranskum løgfrøðingum, sum sær til hjálpar høvdu tann navnframa belgiaran Henri Rolin, ið var professari í altjóða rætti.

Men royndirnar hjá bretum miseydnaðust. Orsøkin var tann prinsipielt sera týdningarmikla - sum Rolin ferð eftir ferð vendi aftur til - at dómstólurin í Haag einans hevði rætt til at døma í sakarmálum millum ríkir. Men spurningurin um tjóðartøkuna av Anglo-Iranian var hinvegin ein sak millum eitt ríki og eitt felag. Tann 22. juli 1952 vísti dómstólurin í Haag málið frá sær.

## SABOTASJA

ÓLÍKA BETUR eydnaðust tey búskapar- og handilsligu tiltøkini. Longu í august 1951 setti Bretland t.d. í verk bann fyri at flyta út sukur og stál til Iran. Bretar gjørdu umframt tað av lutvís at fáa onnur lond at nokta oljuserfrøðingum útferðarloyvi til Iran, lutvís at leggja trýst á møguligar oljukeyparar og í evstu syftu at brúka vald móti tangaskipum. Men allarfyrst brúktu teir sabotasju.

Tá ið iranar skuldu fara til verka á tí tjóðartikna oljuverkinum við Abadan, vísti tað seg ferð eftir ferð, at maskinurnar gingu fyri. Sambært tí bretska aðalstjóranum Eric Drake høvdu bretskir stjórar, áðrenn teir fóru avstað, við vilja syrgt fyri, at tólini skuldu vera í ólagi.

Ivaleyst hevði borið til at vunnið á hesum vansa, um Iran kundi seta fólk við tøkniligum kunnleika til at væla um maskinurnar. Men tá ið søkt varð eftir teknikarum og verkfrøðingum, og játtandi svar komu úr mongum londum, fingu serfrøðingarnir ikki útferðarloyvi. Bretland hevði rætt og slætt yvirtalað lond sum Svøríki, Eysturríki, Frakland, Sveits, Týskland og USA til at nokta fakfólkum útferðarloyvi til Iran.

## HANDILSBANN

HÓAST HESAR atgerðir lukkaðust væl, bóru bretar ótta fyri, at okkurt hol fór at vera í teirra stongsli, ella at Iran fór at kunna flyta út óviðgjørda ráolju. Anglo-Iranian setti nú lýsingar í bløð kring heimin, har hótt varð við "neyðugum atgerðum" móti londum, sum keyptu iranska olju.

Men ikki øll lond vóru fús at akta bretar. Eitt nú eydnaðist í fyrru helvt av 1952 tangaskipum úr Argentina og Japan hóast tann bretska stongsulin at føra olju úr Abadan. Nú var bretum greitt, at brúk var fyri dyggari atgerðum. Um hetta mundið, á sumri 1952, beyð eitt italskt oljufelag sær til at keypa 20 milliónir av iranskari ráolju tey komandi tíggju árini.

Iran var um hetta mundið um at fara á húsagang. Men kom hesin handilin í lag, var landsins búskapur bjargaður.

Tað italska felagið leigaði tangaskipið *Rose Mary* til at føra oljuna til Italia. Á heimleið varð skipið tikið av bretska herflotanum og tvingað inn í havn í tí bretska varðlandinum Aden.

## SKARPARI LÚTUR

HENDA VALDSGERÐ var ein lemjandi vanlukka fyri Mossadegh og hansara stjórn. Einki oljufelag tordi nú at keypa ráolju úr Iran. Brátt var landsins høvuðsinntøka horvin. Inntøkan av oljuinnflutningi fyri 1950 - sum fevndi um 70% av landsins útflutningsvirði - var 45 milliónir dollarar. Árið eftir var hon minkað niður í helvt. Og í 1952 kom hon niður ímóti null.

Meðan bretar soleiðis, við handilsbanni og valdsgerðum á sjónum, táttaðu kjaftbandið um Iran, vórðu land og stjórn hótt av vaksandi ruðuleika. Búskaparliga nærkaðist Iran húsagangi. Í tjóðartinginum harðnaði orðaskiftið. Misnøgdin við Mossadegh var vaksandi. Varligir politikarar ávaraðu um, at stjórnin koyrdi landið út av egg-ini. Bløðini, sum høvdu fingið meira frælsi enn nakrantíð fyrr, leikaðu í við ákærum og spádómum um undirgang.

Nakrar dagar var líkt til, at bretar fóru at fáa sín vilja. Nívdur bæði av handilsbanni og vaksandi innlendis misnøgd legði Mossadegh í juli 1952 frá sær.

Men eftirmaður hansara Ahmad Qavam sat einans fýra dagar. Her eiga vit at minnast til, at stjórnin hjá Mossadegh hevði framt ein hóp av tiltøkum, sum høvdu framburð við sær, eitt nú lógir og samtyktir um arbeiðsloysisstuðul, trúarfrælsi, javnrætt fyri kvinnur og frælsi í skúlum og á lærdum háskúlum. Tá ið iranar av álvara skiltu, at teirra fyrsti demokratiski leiðari var fráfarin, vaknaðu teir til dáð. Eftir kravgongur til fyrimunar fyri Mossadegh varð hann tann 21. juli 1952 afturvaldur til forsætisráðharra.

Bretum var nú greitt, at hatifuglurin var ikki so lættur at syfta. Hvørki tann handilsliga klípitongin, fótonglar frá undirbrotligum europeiskum londum ella valdstiltøk frá The Royal Navy vóru nóg mikið til at fella tann gamla demokratin úr Khorasan. Skarpari lútur skuldi til.

## INNRÁS ELLA KVETT?

LONGU STUTT eftir at Mohammad Mossadegh hevði tjóðartikið ta iransku oljuna, var hugskotið at fella hann og hansara stýri við makt borið fram á fyrsta sinni. Bretar høvdu upprunaliga hugsað um at gera innrás í Iran. Men hetta varð hildið at vera ov sjónskt og klombrut. Tískil var kvettloysnin vald. Kvettætlanin, sum sjálvsagt skuldi vera loynilig, skuldi vera løgd til rættis í Bretlandi og USA. Men sjálv tann ítøkiliga atgerðin skuldi verða framd í samstarvi við ørindasveinar í Iran, sum skuldu yvirtalast við stórum pengaupphæddum.

Nakað lítið mál var hetta ikki. Mossadegh varð valdur til forsætisráðharra av einum at kalla einmæltum tjóðartingi. Tann fylking, sum stuðlaði hann, hevði breiða undirtøku bæði á tingi og millum fólk. Undir hansara leiðslu var eitt stórt land í Miðeystri, við einum av heimsins elstu mentanum, á veg fram ímóti einum vesturlendskt dæmdum fólkaræði, har sjónskt skilarúm var millum øðrumegin ta islamsku trúnna og hinumegin stýrisskipan, borgaralig rættindir og lógir.

## ATTLEE OG TRUMAN ÍMÓTI UPPÍLEGGING

TA FYRSTU tíðina høvdu hesar ætlanir kortini ikki undanvind á hægri stigi, hvørki í Bretlandi ella USA. Í Bretlandi valdaði um hetta mundið ein javnaðarstjórn, við Clement Attlee sum forsætisráðharra. Uttanríkisráðharri hansara Herbert Morrison tók av fullum huga undir við hugskotinum at leggja upp í innlendis iransk viðurskiftir.

Attlee himpraðist í fyrstuni, men vendi sær so ímóti hesi ætlan. Hansara egna stjórn hevði fá ár frammanundan tjóðartikið eitt nú kolídnað og jarnbreytir. Hvussu kundi ein slík stjórn loyva sær at herja á lond, sum valdu at ganga somu leið?

Í USA var uppaftur verri byrur fyri uppílegging. Forsetin Harry S. Truman og uttanríkisráðharri hansara Dean Acheson bygdu hugsjónarliga á somu frælsistankar, sum upprunaliga høvdu skapt USA.

Tann samanrenning av nationalismu og fólkaræði, sum

*Framhald á næstu síðu*